## Obertan til United

20 ára gamli leikarin Gabriel Obertan er ávegis frá Girondin Bordeaux til Manchester United. Tað skrivar soccernet.com. Obertan verður av mongum mettur at vera ein tann mest evnaríki leikarin í Frankaríki. Bæði Inter, AC Milan og Chelsea hava eisini víst áhuga fyri Obertan, men alt bendir á, at tað verður Manchester United, sum fer avstað við U21-landsliðsleikaranum.



## Tevez er eingin svíkur

Carlos Tevez er sannførdur um, at hann ikki verður skýrdur at vera ein svíkur av United-fjepparunum, um hann skiftir til Manchester City. – Tey mugu minnast til, at so vítt eg veit, var tað eg, ið varð frystur úti úr felagnum, og tí má kanna tey bestu tilboðini, eg fái, sigur Carlos Tevez sambært soccernet.com. Chelsea sigst eisini vera eftir Tevez, men soccernet.com vil vera við, at tað helst verður Manchester City, sum fer við argentinumanninum.

# Aksel og Bjartur vóru einaráðandi

**Tað er sjáldsamt at síggja tveir spælarar, sum samstarva so væl í tvímansleiki, sum Aksel Poulsen og Bjartur Lamhauge gera tað. Í finaluni leygardagin staðfestu teir til fulnar, at teir vóru suverenir á Oyggjaleikunum á Álandi**




Hilmar Jan Hansen




**Aksel Poulsen og Bjartur Lamhauge vóru nógv tað besta parið í tvímansleiki á Oyggjaleikunum, og í løtum spældu teir so væl saman, at teir næstan kundu gjørt tað við bindi fyri eyguni**

Mynd: Álvur Haraldsen

Hóast grønlendingarnir, Frederik Kjærholm Elsner og Mininnguaq Kleist, vóru væl við í byrjanini í fyrsta setti, høvdu teir í veruleikanum ikki ein livandi kjans í finaluni ímóti Aksel Poulsen og Bjarti Lamhauge, sum eftir ta fyrstu leitandi løtuna fullkomuliga settu seg á finaluna.

– Í tvímansleikinum hjá monnum vóru vit ein klassa betri, og eg haldi, at Aksel og Bjartur spældu upp til sítt besta. Kanska serliga Bjartur spældi væl, so hann mundi vera serliga uppsettur til dystin, helt annar av venjarunum, Tobias Effersøe, eftir dystin, sum Aksel og Bjartur vunnu 2-0.

Teir høvdu grønlendingarnar hangandi í sær ta fyrstu løtuna, men settu so ferð á spælið, og eftir at fyrsta sett endaði 21-16, gjørdist tað uppaftur meira sannførandi, tá teir í øðrum setti vunnu 21-11 og harvið eisini gullið.

– Hetta var heilt fantastiskt. Hetta ætlaðu vit okkum í 2005, men fingu tað ikki, og eg hevði ikki fingið frið í hjartað, um tað ikki eydnaðist nú. Vit vóru so klárir, sum vit kundu verða tað, segði Bjartur Lamhauge, sum saman við Aksel mannaði nógv tað besta parið í tvímansleiki á Oyggjaleikunum.

### Bind fyri eyguni

Í løtum sá tað so leikandi lætt út, at tú næstan kundi trúð, at teir kundu spælt og vunnið við bindi fyri eyguni. Bjartur viðurkennir eisini, at tað er nakað heilt serligt at spæla saman við Aksel: – Vit kenna hvønnannan út og inn á vøllinum, men um vit spæla saman við onkrum øðrum undir venjing, er einki skil á. Vit passa øgiliga væl saman, segði Bjartur.

Aksel tekur undir við tí, men leggur eisini dent á, at alt badmintonliðið eigur avrikið og at talan er um eina stóra framgongd.

– Hetta er ótrúliga deiligt, og hesum havi eg longst eftir. At tað hevur gingist so væl hjá føroyskum badminton í Álandi, man vera, tí vit hava brotið ísin. Hetta liðið er øgiliga gott, og tey flestu av okkum eru ung enn, og nú er tað okkara tíð. Nú eru tað vit, sum skulu vinna, segði Aksel Poulsen, sum í tvímansleikinum reistist aftur, eftir at hann fyrr um morgunin var útsligin í einmansleiki.

Tá tapti hann 0-2 fyri Bror Madsen úr Grønlandi, ið vann settini 21-18 og 21-19. Í báðum settum kom Aksel væl afturíaftur, men rakk bara akkurát ikki allan vegin. – Ja, tað var eitt keðiligt tap. Serliga tá eg síðani sá, hvussu lætt tað var hjá Elsner at vinna finaluna ímóti Bror, staðfesti Aksel, ið sostatt fekk eitt gull- og eitt bronsumerki leygarmorgunin.

# Best í badminton

**Ongantíð fyrr hava føroyskir badmintonspælarar havt einar so góðar oyggjaleikir, sum hesa ferð í Álandi. Toppurin var tey trý gullmerkini, ið vóru tey fyrstu nakrantíð. Spælararnir eru ungir enn, so góðar vónir eru fyri framtíðina hjá føroyskum badminton**




Hilmar Jan Hansen

Samstundis sum badmintonfólkini sólaðu sær í gulli og øðrum heiðursmerkjum á Oyggjaleikunum í Álandi, vóru 80 børn og ung á badmintonskúla í Havn. Tað sigur kanska eitt sindur um, at tað sær bjart út fyri framman hjá føroyskum badminton. Spælararnir, sum vóru við í Álandi, eru enn ungir og kunnu halda á í mong ár aftrat, umframt at eitt stórt arbeiði verður gjørt við at seta við.

Trý gullmerki, umframt eitt silvur- og eitt bronsumerki, er avgjørt størsta úrtøkan nakrantíð, og tí var heldur ikki so løgið, at Høgni Carlsson, sum hevði tvær døtur við á landsliðnum, umframt at hann var liðleiðari, var sera væl nøgdur, tá alt var av.

– Eg kann ikki vera annað enn ótrúliga væl nøgdur. Eg eri ófatiliga erri av spælarunum og tí, teir hava avrikað. At vit skuldu fara at vinna trý gullmerki, høvdu vit ikki torað at droymt um áðrenn. Men vit hava lagt øgiliga stóra orku í at menna spælararnar, sum taka hetta í stórum álvara, so tað er gleðiligt, at tað gevur úrslit, segði Høgni Carlsson.

– Her er øgiliga stór framgongd, og fleiri av hinum undrast á, at vit eru blivin so sterk. Nú hevur so Gotland eisini bjóðað okkum at koma at spæla onkra kapping hjá teimum, so tað er stuttligt. Vit skulu nú til at finna onkra góða kapping næsta ár, so vit eru væl fyri at verja gullið um tvey ár. Og kanska var tað allíkavæl gott, at vit ikki vunnu alt hesa ferð, tí nú hava vit framvegis okkurt gott at fara eftir.

### Hyggja frameftir

Høgni sigur, at Sigrun Smith hevur styrkt væl um føroyska hópin, men at badminton haraftrat hevur havt ótrúliga dugnaligar venjarar, sum hava tikið sær væl av spælarunum, ið veruliga toppaðu í Álandi.

– Nú standa vit við øgiliga góðum spælarum, harav fleiri eisini eru ungir og eru á veg fram. Vit hugsa eisini longur fram og hava tikið upp samstarv við Grønland og Ísland um tey ungu, U13, U15 og U17, og í heystfrítíðini fara vit til Íslands, umframt at vit sjálv skulu skipa fyri kapping í heystfrítíðini næsta ár, segði Høgni Carlsson.

– Helst mugu vit eisini hyggja enn meira úteftir, fyri at finna nakrar avbjóðingar til landsliðið. Har hava vit tíbetur gott samstarv við europeiska badmintonsambandið, so vit kunnu saktans loyva okkum at miðja eftir eitt sindur hægri stigi. Danmark er eisini ein sterk tjóð í badminton, so har hava vit kanska eisini møguleika fyri avbjóðingum, ið kunnu menna okkara spælarar enn meira.

Botnurin undir framúr góðu úrtøkuni var lagdur í liðkappingini fyrst á leikunum, har tað eydnaðist Føroyum at vinna á øllum teimum, ið vanliga hava verið tey sterkastu, so fyrsta gullið nakrantíð kom til høldar. Og krúnan á verkinum var so leygardagurin, tá enn fleiri heiðursmerki vóru vunnin, hóast tað týðiliga sást, at føroysku spælararnir nú vóru blivnir moyrir eftir eina tunga og strævna, men góða viku.